LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

11.02.2019
Lógartænastan
NF

# Upprit um at endurskoða kunngerð um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum

## Orsøk til at málið verður tikið upp

Dátueftirlitið hevur mælt landsstýrinum til at endurskoða *kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum*.

Tilmæli er grundað á, at Sameinda Kongsríkið (SK) eftir øllum at døma fer úr Evropasamveldinum (ES) tann 29. mars 2019. Í mun til flutning av persónsupplýsingum til útlond hevur tað avleiðingar, at eingin avtala er millum Føroya og SK.

Um eingin exitavtala er millum SK og ES, sum tryggjar t.d. status quo millum londini, verður SK í ES høpi de facto eitt triðjaland. Uttan eina *adequacy decision* frá ES verður SK at meta sum ótrygt triðjaland.

## Málslýsing

Flutningur av persónsupplýsingum til útlond er viðgerð av persónsupplýsingum, sum er fevnd av løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004.

Tá ið ræður um flutning av persónsupplýsingum sambært galdandi rætti, kunnu persónsupplýsingar við fráboðan til Dátueftirlitið flytast til útlond, sum eru góðkend sum trygg útlond. Við kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum góðkennir Føroyar í dag lond í ES, Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum (EBS), Argentina, Guernsey, Isle of Man og Sveis sum trygg triðjalond.

Flutningur av persónsupplýsingar fer í dag fram millum Føroyar og SK, og fleiri fyritøkur í Føroyum hava avtalur við fyritøkur í SK um at viðgera persónsupplýsingar.

Tá ið SK tann 29. mars 2019 fer úr ES, er SK ikki longur fevnt av galdandi kunngerðini. Hetta merkir, at persónsupplýsingar ikki uttan víðari kunnu flytast úr Føroyum til SK, men bert við loyvi frá Dátueftirlitinum. Viðgerðartíðin og óvissan í,

um loyvið fæst til vega ella ikki, darvar flutningin, og hetta kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri fyritøkur í Føroyum og SK.

Tá ið vánirnar um at røkka eini avtalu millum ES og SK gjørdust ringar og til tess at byggja upp fyri báru, vendi International Data Unit at the Department for Digital, Culture, Media and Sport í SK sær í fjør til sendistovuna í London við fyrispurningi um at góðkenna SK sum trygt útland og harvið tryggja framhaldandi streym av persónsupplýsingum millum Føroyar og SK.

**Tilmæli frá Dátueftirlitinum**
Fyrispurningurin varð sendir Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi gjørt eina meting av SK sum trygt útland. Fyrst í nýggja árinum bar International Data Unit fram ynski frá myndugleikum í Gibraltar um at taka Gibraltar við í føroysku kunngerðina. Dátueftirlitið hevur tí eisini gjørt eina meting í mun til Gibraltar.

Í metingini hevur Dátueftirlitið lagt dent á galdandi lóg í SK og Gibraltar fram til og eftir 29. mars 2019. Tilfarið, sum Dátueftirlitið hevur viðgjørt, vísir, at lógin um dátuverju er tann sama í SK og Gibraltar sum í ES bæði fram til og eftir 29. mars 2019. Dátueftirlitið mælir tískil landsstýrinum til at broyta kunngerð nr. 33 soleiðis, at hon umframt tey lond, sum ES í dag góðkennir, eisini fevnir um Sameinda Kongsríkið og Gibraltar.

Dátueftirlitið mælir tískil til, at nýggja kunngerðin umframt SK og Gibraltar eisini skal fevna um Andorra, Kanada, Ísrael, Jersay, New Zealand og Uruguay.

Við nýggju kunngerðini ber til at varðveita avtalur um flutning og viðgerð av persónsupplýsingum, sum frammanundan eru galdandi millum londini, og tingini kunnu virka óbroytt uttan mun til Brexit.